# Fyrsti starvsdagur hjá nýggja umboðsmanninum

**Hjá Sólju í Ólavsstovu gjørdist fyrsti arbeiðsdagur í nýggja árinum eisini hennara fyrsti dagur í starvinum sum Løgtingsins Umboðsmaður**

STARVSDAGUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nýggi løgtingsins umboðsmaður fekk okkurt á tríva í longu frá fyrstu løtu í nýggja starvinum. Longu frá morgunstundini lógu fleiri mál á skrivaraborðinum hjá Sólju í Ólavstovu klár at fara í holt við.

- Mín undanmaður hevur avgreitt allarflestu málini, aðrenn eg byrjaði. Okkurt er tó eftir, so tað er fínt hjá mær at koma í gongd við beinanvegin, sigur Sólja.

### Fjølbroytt avbjóðing

Nýggja starvið er ikki bara ein stór avbjóðing í sær sjálvum. Løgfrøðiliga kann Sólja eisini vænta sær eitt sera fjølbroytt starvsøki.

- Kærurnar til løgtingsins umboðsmann kunnu viðvíkja liðum í allari fyrisitingini. So eg kann í prinsippinum koma at arbeiða við øllum frá skattamálum til byggimál og alt inn í millum, sigur Sólja.



*Sólja í Ólavsstovu hevði onkur mál at tríva í longu frá morgunstundini, tá hon í morgun kom fyrstu ferð til arbeiðis í nýggja starvinum sum Løgtingsins umboðsmaður*

Sum løgtingsins umboðsmaður kemur Sólja tó ikki bert at sita og bíða eftir, at borgarar kæra um eitthvørt. Ein líka týdningarmikil partur av starvinum er, at umboðsmaðurin sjálvur tekur mál upp, har t.d. mannagongdir tykjast ivasamar. Í báðum førum virkar umboðsmaðurin sum ein trygd hjá vanliga borgaranum fyri at viðurskifti verða kannaði til botns av fakfólki.

Hóast uppgávurnar hjá umboðsmanninum í høvuðsheitum eru at fáa greiðu á, um eitt mál var rætt ella skeivt avgreitt, er starvið ikki bert afturlítandi.

- Endamálið við at kanna kærurnar er jú millum annað fyri at syrgja fyri, at tað sama ikki endurtekur seg, um ikki alt ikki er farið rætt fram. So í so máta er hetta starvið við til at stinga út í kortið mannagondir í miðfyrisitingini framyvir, sigur Sólja.

### "Umboðskvinna"

Hóast onkur ivaleyst vil halda, at heitið "umboðsmaður" ikki er serliga hóskandi at brúka, nú tað er ein kvinna, sum situr í starvinum, dugir Sólja ikki at síggja nakra orsøk at broyta tað.

- Hetta er jú eitt starvsheiti, sum ikki er tengt at einum ávísum kyni. Í veruleikanum sipar Løgtingsins umboðsmaður til ein stovn heldur enn ein persón. Tað eitur faktiskt eisini "ombudsman" á enskum, so nei, hatta er ikki nakað, eg haldi vit skulu broyta, sigur Sólja, sum heldur tað vera hugsandi, at fólk kanska fara at tosa um "løgtingsumboðið" ella líkandi á sama hátt, sum vit vanliga tosa um ríkisumboðið og ikki ríkisumboðsmannin.

# Ársins fyrsti føroyingur seinkaður

**Ársins fyrsti føringur 2006 varð føddur á Landssjúkrahúsinum í gjár tvær vikur seinni enn væntað**

ÁRSINS FYRSTI FØROYINGUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ársins fyrsti føroyingur gjørdist ein fittur drongur, sum máldi 54 cm og vigaði 4600 g. Foreldrini eru Marjun Brockie úr Havn og Eyðfinn Pattinson úr Funningsfirði. Stolta stórasysturin eitur Katrin og er 6 ár.

Alt gekk, sum tað skuldi, tá ársins fyrsti føroyingur kom til verðina kl. 17.42 í gjár. Ella tað vil siga næstan alt, tí Marjun varð sett at eiga longu 19. des. Ársins fyrsti føroyingur var sostatt tvær vikur seinkaður.

- Fyrst hopaði eg, at eg fór at eiga áðrenn jól. Men tá tað dróg út, hopaði eg bara ikki, at eg fekk verkir sjálvan jólaaftan, tá øll familjan skuldi verða samla til jóladøgurða norðuri í Funningsfirði. Men eg væntaði avgjørt ikki, at eg skuldi bíða til 2006 sigur Marjun, sum nú bara er glað fyri at lítlibeiggin er komin til verðina í øllum góðum og sær út til at trívast væl.



*Ársins fyrsti føroyingur 2006 gav sær góða tíð at koma til verðina. Foreldrini eru Marjun Brockie og Eyðfinn Pattinson*